# 2005

# ÍTRÓTTARFELAG FUGLAFJARÐAR




# ÍF – GÍ

**FORMULADEILDIN**

**Sunnudagin 21. august 2005 Kl. 15.00 í Fuglafirði**

HAVSBRÚN

formuladeildin

TOYOTA MIKLAGARÐUR P/F Petur Larsen

**Ítróttarfelag Fuglafjarðar**
Postboks 94
530 Fuglafjørður
Tel 444636 / 228771
Fax 444634
www.if.fo
if@if.fo

**Leikskrá 9 2005**

**Útgevari:**
**Ítróttarfelag Fuglafjarðar**
**ÍF-stuðlar**

**Ábyrgd**
ÍF-stuðlar

**Blaðnevnd**
ÍF-stuðlar

**Myndir**
Ólavur Frederiksen,
faroephoto.com
Rógvi Róin

**Kápumynd**
Hanus Eliasen
hevur tamarhald á
støðuni, meðan Fróði
Benjaminsen, B36, má
bíta í grasið
*Mynd: Ólavur Frederiksen, faroephoto.com*

**Prent**
Estra

**Uppseting**
Sisero 351800

### TAÐ HALDA VIT

# Tøkk til sponsorarnar

Ikki er neyðugt her at greiða frá, hvønn týdning sponsorar hava fyri føroyskan ítrótt, serliga fótbóltin. Flestu er væl greið yvir, at skal ein hava eitt vælvirkandi lið í bestu deildini, so krevst peningur, nógvur peningur, og ein stórur partur av hesum peningi kemur so frá sponsorum, sum vit halda, eiga at fáa eitt herðaklapp.

Tá ein lýtir seg umkring við vøllin, ella blaðar í hesi leikskrá, sæst, hvørjar sponsorar ÍF-Fótbóltur hevur í ár. Ein leggur til merkis, at fleiri eru afturvendandi ár eftir ár, meðan aðrir velja at verða við av og á. Allir hava tó tað til felags, at teir stuðla ÍF, og tað eru vit sera takksom fyri. Hygg einaferð aftrat eftir reklamunum, og legg til merkis, hvør er við. Nýt hesa vitan, tá tær tørvar tænastur, ið hesi kunnu veita, og sig teimum, at tú hevur lagt til merkis teirra stuðul til felagið.

Tað kann verða so ymist, hvat sponsorarnir sjálvir fáa burturúr tí reklamu, sum vit kunnu veita teimum, men tað hevur týdning, at vit øll geva hesum ans, og at vit brúka hetta positivt. Legg til dømis merki til, hvørjir peningastovnar stuðla, og hvør ikki ger, hygg hvørjar bilasølur, verkstøð, handlar, handverkarar o.s.fr. eru stuðlar. Men tú mást lova, ikki at misbrúka hetta, tí tað eru heldur ikki allir sponsorar, sum eru so sjónligir. Nakrir hava valt at stuðla øðrum greinum í felagnum, og onkur verður kanska við næsta ár. Og ert tú gestur aðrastaðni frá, so kanst tú seinni kanna eftir, hvussu vorðið er heima hjá tykkum.

Okkara høvussponsorar í ár eru Havsbrún, P/F Petur Larsen, Reyni Service og Miklagarður, men

Framhald á bls. 5





### DYSTURIN Í DAG

# Týdningarmikil grannauppgerð

Millum ár og dag hav vit leikt nógvar dystir ímóti grannunum hinumegin eiðið. Úrslitini hava verið svingandi, ikki minst seinnu árini hevur GÍ verið omaná. Meðan vit ein stóran part hava leikt í 2. deild, hava gøtumenn verið í 1. deild. Teir hava enntá verið millum fremstu liðini í deildini, og hava teir eisini vunnið fleiri meistaraheitið og steypakappingar hesa tíðina.

Í ár hevur tó ikki gingið væl í landskappingini. Teir fingu eina sera ringa byrjan á kappingarárið, og fyrstu stigini komu ikki fyrrenn í 4. umfarinum, tá teir vunnu 0-1 á VB í Vági. Síðani gingu aftur fýra umfør við ongum stigi, og eftir 9. umfar 16. mai høvdu teir bara 4 stig.

Áðrenn dystin í dag liggja teir á einum 7. plássi saman við VB bara eitt stig aftanfyri okkum og tvey frammanfyri KÍ á 9. plássi. Men fimm teir næstu dystirnar fingu teir heili 10 stig, og fóru frammum okkum á stigatalvuni. Hetta kendist sárt, serliga tá hugsað verður um góðu byrjanina hjá okkum á kappingina og vánaligu hjá GÍ. Ikki minst sárt kendist tað fyri okkara menn, venjarar, hjálparfólk og áskoðarar tá vit taptu finaluna um Løgmanssteypið á ólavsøku. Vit taptu heili 4-1 ímóti einum – sum altíð – ágrýtnum GÍ-liðið, sum, nógv meira enn vit, vildi vinna dystin ... tíverri.

Útlitini fyri góðum úrslitum í seinnu hálv gjørdust heldur ikki betur, tá ið vit mistu tríggjar av okkara føstu leikarum eftir finaluna. Fritleif og Eyðolvur eru fluttir til Danmarkar, meðan Magni av heilsuáðum hevur fingið forboð frá læknum nakrantíð at

Framhald á bls. 32














Framhald frá bls. 2

nógvir aðrir hava stuðlað óført, eingin nevndur, men so sanniliga eingin gloymdur. Haraftrat koma so tey, sum hava stuðla og hjálpt til í sambandi við tiltøk og í tí dagliga arbeiðinum. – Tøkk skulu tit hava øll somul.

Hinvegin halda vit, at stuðulin millum manna hevur skortað, og okkurt átak stílað til vanliga fjepparan, sum vit høvdu væntað okkum nógv av, fekk tó lítla og onga undirtøku. Nevnast kunnu t.d. fastar flytingar, har ein kann tekna seg fyri eini upphædd millum kr. 100 og kr. 1000 um mánaðin, og so tað, sum vit nevna "1600pluss kortið", har goldið verður ein upphædd, minst kr. 1.600,- og so fær ein ávísar fyrimunir, íroknað ókeypis atgongd til ALLAR heimadysti. Nøkur trúføst viðhaldsfólk hava tikið av hesum møguleika, men ov fá - alt ov fá.

Jú, sponsorar og stuðlar eru neyðugir, og vit hava teir, men kundu hugsað okkum nakrar fleiri. At tað krevst fyri at hava eitt gott lið er rætt, men nú bert ein triðingur er eftir av Formula-kappingini í ár, mugu vit sanna, at tað er ikki nokk. -Higartil eru tað bert vunnir dystir, og ikki sponsorar, ið geva 3 stig, og sigrarnir eru tíverri sum lundi á jólanátt. Men hevur henda grein nomið við okkurt, so tú kanska hevur hug til at verða ein av sponsorum ella stuðlum okkara, so ert tú meira enn vælkomin til at nevna tað við onkran í ÍF-stuðlunum, sum hava við inntøkur og sponsorar at gera.

Enn einaferð takk til tykkum øll ið stuðla, og góðan dyst.



Fuglafjarðar Træsmiðja

Snikkaraarbeiði
• Vindeygu
• Úthurðar
• Trappur
• Umvælingar

Tel: 44 42 34
Tel: 21 42 34
Toftagøta 12
530 Fuglafjørður

Fuglafjarðar Træsmiðja
við Jóhan Larsen

fk
Fuglafjarðar
Keypsamtøka
Tel. 444 095 - 444 495 Fax 444 895

FAXE KONDI



# Mist týðandi leikarar í summarsteðginum

Summarsteðgurin í landskappingini – ella ætlaði summarsteðgurin mugu vit nokk heldur skrivað, tí okkara menn hava nærum ongan havt – hevur verið keðiligur fyri okkara viðkomandi. -Ein tapt finala um Løgmanssteypið á Ólavsøku og missurin av týðandi leikarum. –Eyðolvi, Frileifi og Magni, sum allir hava verið fastir í byrjanuaruppstillingini hjá Petur og Sonna í fyrruhálvu, eru givnir í juli mánaða. Fritleif er farin í læru á Estra sum prentari, og fór tí beinanvegin til Danmark í skúla. Har skal hann verða í 20 vikur, og verður tí ikki tøkur aftur í ár. Eyðovlur boðaði ÍF frá áðrenn kappingin fór í gongd, at hann bara var tøkur til august mánaða, tí hann flutti til Danmarkar, har Bjørg skal undir útbúgving. Eyðolvur hevur verið drívmegin á miðvøllinum í ár, og hevur víst fyrimyndarligan hugburð, tí er spell, at vit hava mist hann. Vit væntað og vóna tó, at teir báðir eru sinnaðir at koma til Føroyar at hjálpa okkum um neyðugt, onkran av teimum dystunum, sum eru eftir av kappingarárinum.

Verri er við Magna, sum hevur havt pínu í mjødnini nærum alt ár. – Serliga síðstu mánaðirnar hevur verið trupult hjá honum at leikt við fullari megi, og tað endaði við, at hann fór til kanningar á Landssjúkrahúsinum. Har vístu kanningar, at mjødnin hjá Magna er somikið nógv slitin, at læknarnir ikki mettu tað verða ráðiligt hjá Magna at leika fótbólt longur. Hetta kom eisini sera illa við, tí eins og Eyðolvur og Fritleif, høvdu vit sett okkara álit á Magna, sum ein av eldru og meiri garvaðu monnunum á liðnum. Men heilsan er ikki at spæla við, og hava vit tí loyst Magna úr sáttmálanum, og verður Magni neyvan nakrantíð aftur at síggja á fótbóltsvøllinum. –Vit kunnu tí í dag bara gleðast um at hava uppfostrað ein so góðan fótbóltsleikara í felagnum og samstundis fegnast yvir, at hann vildi leika síðstu árini í barndómsfelag sínum, sjálvt um hann er búsitandi í Havn.

**Nýggir leikarar í hópinum**

Tí hava vit í ÍF-stuðlun í summarsteðginum arbeitt av øllum kreftum at styrkja um liðið, tí, sum flestum kunnugt, er hópurin ikki serliga breiður, og tá ið skaðar eisini hava plága liðið, er serliga tunnligt í hópinum. THetta hevur partvíst eydnast og hava vit fingið tveir nýggjar leikarar til felagið, samstundis sum leikarar á 3. deild hava fingið møguleikan. Vit hava gjørt leigusáttmála við HB um unga miðvallaran Emil, og spælir hann við okkum restina av kappingarárinum. Vit hava eisini gjørt avtalu við málverjan Jacob Kaas úr Svendborg. Hetta kann nú sigast at hava verið ein heppin avgerð nú Tórður fekk skaða. Jacob hevur staðið sum ein brandur teir báðar dystirnar á Tvøroyri og á Eiði.

Vit arbeiddu við øðrum leikarum eisini, men valdu í samráð við venjarar og nevnd at satsa uppá okkara egnu, og vísa teimum enn meira álit. Hetta hevur inntil víðari eisini víst seg at vera ein røtt avgerð, tí teir hava víst ein innsasts, sum sjálvdan áður.

# LEIKARIN HESA FERÐ FRANK H. POULSEN



**TÚ**

**Navn:** Frank H. Poulsen
**Føðingardagur:** 03.11.1988
**Starv:** Alilaks
**Hædd og vekt:** 175-180 cm og 65 kg.
**Størsta styrki:** Positivur persónur
**Størsti veikleik:** Illsintur og luftspælið
**Torførast mótstøðumaður:** Higartil veit ikki
**Frítíðarítriv:** fótbóltur
**Vónir fyri 2005:** at vit enda frammanfyri GÍ í landskappingini

**Tín Ítrótt**

**Pláss á vøllinum:** mitt á miðjuni
**Fyrsti dystur á 1. liði:** síðsti landskappingardystur í fjør ímóti KÍ í Klaksvík
**Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF:** tá eg var umleið 6 ár
**Aðrarítróttargreinar:** onga
**Minningarríkasti dystur:** mín fyrsti dystur í 1. deild í fjør
**Størstu fótbóltsliga ávirkan:** babba og allar hansara søgur frá tí Harrans ári 1979
**Besti fótbóltsleikari:** Ronaldinho
**Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt:** borðtennis
**Hvat slag av venjing dámar tær best:** spæla millum tvey mál
**Hvat slag av venjing dámar tær ikki:** renning uttan bólt
**11 teir bestu fótbóltsleikararnir í heiminum:** Van der Saar – Cafu, Ferdinand, Nesta, Heintze – Ronaldo, Zidane, Scholes, Ronaldinho – Shevchenko og Rooney

**Tínir favorittar**

**Matur og drekka:** ræstan fisk og Kondi
**Besta árið og hví:** 1988, tí eg varð føddur
**Slag av tónleiki:** rock
**Besta sending í SvF:** 3-2, avgjørt!
**Besti filmur:** Con Air
**At slappa av:** at síggja ein góðan Premier League dyst
**Besti fótbóltsleikari yvirhøvur:** Ronaldinho
**Stuttligasti persónur:** Eyðun Ryggshamar
**Sjónvarp/filmstjørna:** Simon Kvamm
**Sangari/sangarinna:** Joey Tempest
**Besta bók/blað:** Leikskráin, serliga tann nýggjasta






Tilfar til umvælingar, åbøtur ella annað ...
... spyr fyrst hjá okkum!

Fuglafjarðar Timburhandil
tel. 444 126



Fjølbroytur veitari til vinnuna

KJ er ein fjølbroytt fyritøka, sum veitir útgerð, eykalutir og tænastur til fiskivinnuna, alivinnuna, flutningsvinnuna og entreprenørvinnuna. Í okkara úrvali av útgerð finst m.a. trolspøl, kranaspøl, marinekranar, lastbilakranar og gravimaskinur. Í okkara stóru eykalutagoymslu hava vit hydraulikkfittings, slangur, rør, pumpur, motorar, ventilar, koblingar, tetningsringar o.m.a.



- Spøl
- Kranar
- Hydraulikklutir
- Filtur
- Aliútgerð
- Katamaranar



KJ HYDRAULIK
POWER & MOTION CONTROL

P.O. Box 110 á Kambsdalur · Tel +298 444 170 · Fax +298 444 265 · info@kj-hydraulik.com · www.kj-hydraulik.com



**PLÁTUVERKSTAÐIÐ**
v/ Glenn Perdomo

Undir Krákugjógv 5 Kj.,
Tórshavn tel 321778

**KUNNINGARSTOVAN Í FUGLAFIRÐI**
INFORMATION OFFICE

*Opið:*
*Mánadag - fríggjadag* *kl. 9-12 og 13-17*
*Leygardag* *kl. 9-12*

FO-530 Fuglafjørður
Tlf. (+298) 44 48 60 - Fax (+298) 44 51 80
t-post: infoey-f@post.olivant.fo

**FUGLAFJARÐAR BÓKASAVN**
FO-530 Fuglafjørður
Tlf. 44 47 45 - Fax 44 51 80
t-post: bokasavn@atlantic.fo

*Opið:*
*Mánadag - fríggjadag* *kl. 9-12 og 13-17*
*Leygardag* *kl. 9-12*




Landsins **størsta** og besta úrval



gravering íroknað prísin

EA EILIF ARGE
Tel. 455164 · Fax 457576 · faeilifarge@post.olivant.fo




Kongabrúgvin, Postboks 329, FO-110 Tórshavn,
Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari

formuladeildin



í altjóða kapping....

formula.fo



HAVSBRÚN

Tel. 41 44 00 • Fax 41 44 01 • havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo

Lastvognskoyring



Øll lastvognskoyring verður gjørd

Kári Zachariassen

530 Fuglafjørður
tel 444 245 ella 217 245

BERGFROST
COLD STORAGE

P. O. Box 85
FO-530 Fuglafjørður
Faroe Islands
www.bergfrost.com

Tel +298 44 46 11
Fax +298 44 46 07
Mobile +298 22 36 67
bergfrost@bergfrost.com



# Fuglafjørður

býurin, har mentan og vinnulív taka lógvatak

býurin, har náttura og fólk eru blíð

býurin, har fortíð og nútíð hittast

býurin, har øldirnar tala

**Stutt sagt:**

býurin, har nógv hendir

býurin, ið er eina vitjan verdur

**Fuglafjarðar Kommuna**

P.O. Boks 30 · tel. 444006 · fax 444657

fko@fuglakomm.fo

www.fuglakomm.fo



**Rasmus Joensen**

Málarameistari

530 Fuglafjørður

Tel. 444 139 - 214139

**SANDGREVSTUR P/F**

Norður í Gerði 7

530 Fuglafjørður

Stovnað 1949 - reiðarí innan frakt- & sandbátar

- **Norskur stoypisandur**
- **Hvítur stoypiskervur**
- **Hvítur skervur til tún**
- **Reyður skervur til tún**
- **Fø. stoypi- og pussisandur**
- **Rall**
- **Sandblásisandur**
- **Betongflísar**

**Koyring við kranalastvognum**
**fyri fastar prísir (eisini til Tórshavnar)**

**tel 444121 • 595900 • 595910**



**Tannlæknastovan**

Steintór Larsen | tannlækni

Brynhild Maria Lamhauge | tannrøktari

Viðtala:
8.00-12.00 og 13.00-16.00

Torkilskrókur 8 , 530 Fuglafjørður tel. 444 358

**Vit hava útgerðina**



*VÓNIN*

www.vonin.com




Fysioterapiviðgerðarstova

530 Fuglafjørður
Telefon 44 51 44

Ítróttarhjálparútgerð við lágum prísum: t.d. tape, eingangs ís-posar og 1. hjálpar-/ "læknatasku"

Álvur Hansen, fysioterapeutur







LEVI'S®
RED TAB®
JEANS



Klæði til hennara,
hansara og børnini
- nu lat undir somu lon

VØRDSLAN
WEARHOUSE
Í Støð 6, Fuglafjørður, tel 44 47 47

AVENSIS

TOYOTA



**Avensis**
Einastandandi dygd og koyrigleði.

Vegurin Langi · Hoyvík · Tel. 353040 · Fax 353041
rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F








## VR-Bilar

Hoyvíksvegur 61
FO-100 Tórshavn
tel 32 21 10
telefax 32 21 11
vr-bilar@vr-bilar.fo

Teir nýggju Volvo S40 og V50
Prísir úr **276.000**

Vit umboða eisini Volvo lastbilar, bussar og entreprenørmaskinur

**Opið er soleiðis:**
mánadag til fríggjadag: 08.00-17.00







Eftir dystin bjóðar Shell ókeypis Slush-ice til børnini!
SLUSH-ICE
Vitjið okkum frá kl. 16.30 - 18.00
Tilboðið er galdandi hvønn sunnudag ímeðan kappingin er í gongd
www.shell.fo
Shell-støðin í Gøtudali


AP BUSSKOYRING
V/ Andreas Poulsen
fartel 505220 • 441720


Piddasahandil og Ribarhús
listaframsýningar
heimavirkaðir prýðis- og brúkslutir
føroyskt - »bundið og tøvt« í meturmál
føroyskar fløgur
loppumarknaður
- og altíð ein kaffimuður við »heimabakaðum«
opið er: mán. - frí. 15.00 - 17.30
ley. 11.00 - 13.00
annars eftir avtalu á tlf. 44 44 27
hugnaligt og kveikjandi umhvørvið mitt í býnum í Fuglafirði


Alt innan bátaútgerð
VOLVO PENTA
GPS-plottarar og sjálvstýrarar frá
Cetrek
Bátatænastan
Gríms Kambansgøta 4 • Postsmoga 101 • FO-110 Tórshavn
Tel 31 17 35 • Fax 31 38 35 • e-mail: batataen@post.olivant.fo
www.batataenastan.fo


Góðskan á arbeiðnum altavgerandi
Nýbygging
Umvæling
Ráðgeving
Tekningar
Kostnaðarmetingar
JLJ-Bygging
Verkfrøði og húsasmíð
690 Oyndarfjørður | tel 21 47 87 & 44 47 87 | t-postur: jljuul@post.olivant.fo








Persónsvognur úr kr. **313.291,-** v. mvg
Vøruvognur úr kr. **247.571,-** v. mvg

Skaðaumvæling av øllum bilsløgum
á Hjalla FO-180 Hoyvík Tel 311013 www.kollsker.com

**Bilverkstaðið**
**v/ Hans J. Kollsker**

Vit hava stórt úrval av gløsum, serviettum, dúkum, ljósum og einnýtisborðbúnaði.
Ert tú í iva um mongd, lit ella støðd, ráðgeva vit tær fegin. Vit taka óásettar pakkar aftur.

*Brúðleyp Dóp Veitslu*
*Merkisdag Meistaraheit*



th-dam@post.olivant.fo

Thomas Dam á Hálsi
HÚSGØGN · LEIKUR · NÁTTÚRUDEILD · HEILSØLA
HEYKAVEGUR 3 · TLF. 31 14 00



Jørleif Petersen
*málarameistari*
Fuglafjørður
tel. 444 395 fartel. 214 395

Alt málaraarbeiði verður gjørt!

PrimaVera
ja, tað má tað vera!



Pizzaria
PrimaVera
á Kambsdali tlf. 444446




Sp/f **Jan Mohr**
**Byggivirkið**

**Tlf: 21 99 49 • 21 89 49**


Hugsar tú um at byggja?
Tosa fyrst við okkum!
Her fært tú altíð eitt gott tilboð
Element-& Betongvøruvirkið
við Gjógv
Tlf. 423173-445173


Hugsa tygum um
útskifting ella nýbygging?
- royn okkum!
Vel snið, træsort og viðgerð
Send okkum uppskot
og vit geva tilboð
innan allar seruppgávur
Handverkið ger munin
TRÆSMIÐJAN
317166 GLT
Tórshavn • Tlf. 317166 Faks 318131 • Teldupostur: tra-glt@post.olivant.fo


døgg
.alt innan nýmótans hárviðgerð.
Halla Olsen
tlf. 219379
tlf. 445550
opið er:
mán - frí 10 - 17
hósdag 10 - 19
leygardag 10 - 14
Toftavegur 1 · 530 Fuglafjørður · tlf. 44 55 50


Jolly ®


Hann ger tað ikki lættari at minnast
kotuna á bensinkortinum
Tann nýggi Suzuki Alto
koyrir í meðal 20,4 km.
uppá liturin
SUZUKI
Hann kostar bert:
Kr. 99.990,-
koyriklárur
Suzuki Alto er harafturat fyltur við útgerð so sum powerstýring,
dupult airbags, ABS-bremsum, sentrallás, el-rútum
SUZUKI Berg Motors SUZUKI
Staravegur 1-3, box 1039, 110 Tórshavn - Tlf 313535 Fax 317735

KLAKSVÍKAR AUTOLAKERING

BUMSHAMAR · 700 KLAKSVÍK · TLF. 458787 · FART. 223512 & 223513

Timbur-, betong- og jørðarbeiði

H.K.J. byggivirkið SpF
Postmoga 40
530 Fuglafjørður
Tel. 21 86 96 og 22 77 99
Fax 44 46 56

POUL JOENSEN
LAST & KRANAVOGNSKOYRING

- Last & Kranavognskoyring
- Mini Gravimaskinur
- Mini Lessari
- Útgrevstur við Brøyt
- Betong & Asvaltsaging
- Og mangt annað

Bøvegur 10
530 Fuglafjørður
Tlf: 44 46 42
Mobil: 21 31 95
Fax: 44 42 95





P/F Petur Larsen
Mekaniskur verkstaður
postboks 64
530 Fuglafjørður
tel. 444 174
fax 444 285
al@online.fo

BAADER®

fomaco







P/f Sveisingahandilin

Mykinesgøta 8 - FO-100 Tórshavn - Tlf. 311909


# NÝTT – NÝTT - NÝTT

## ÍF turriklæði og húgvur




| | |
|---|---|
| ÍF turriklæði | kr. 150,00 |
| ÍF húgva | kr. 100,00 |

Turrikløðini og húgvurnar fáast til keyps í Ítróttarhúsinum í sambandi við heimadystir og annars hjá Haraldsen og FK



Alt vanligt verkstaðsarbeiði verður gjørt

SISERO 31800

**Úrvalsbilar SpF**
v/ Magnus Onghamar

Bakkavegur 530 Fuglafjørður tel 444 943 fax 444 638



**Rasmussen & Weihe P/f**
statsaut. grannskoðarafelag

Heiðavegur • P.O. Box 154 • FO-600 Saltangará
tel 35 17 00 • fax 47 17 01
rasmussen@rasmussen.fo
www.rasmussen.fo

International: An associate firm of PricewaterhouseCoopers



P/F Grannskoðaravirkið

**INPACT**
Statsaut. revisorar

R. C. Effersøesg. 26, Tórshavn
Tel +298 31 47 00
Fax +298 31 38 15
inpact@inpact.fo
www.inpact.fo



BREYÐMOLIN
530 Fuglafjørður • Telefon 444388



# HER SÆRT TÚ, HVÍ TANN NÝGGI NISSAN ALMERA EITUR DELTA TIL EFTIRNAVN

BOCCA / petur & petur • 320870




Bilurin á myndini hevur eykaútgerð. Brennievnisnýtsla við blandaðari koyring: 14.9 km/l, CO2 útlát 160 g/km

**DELTA MERKIR ØKING.** Og tað kann veruliga ikki fáast meiri útgerð í Almera Delta. Hóast hetta kostar Almera Delta 1.8 við 5 hurðum bara **189.000,- kr.**

**3 ára** mekaniskt garanti.
**3 ára** lakk garanti.
**12 ára** garanti ímóti gjøgnumtering

NISSAN

P/F Meinhardt Arge
Tel 345400 • www.bilarge.fo

## Lítla sølubúðin í ítróttar-húsinum

Damurnar, sum síðstu árini hava havt sølubúð í ovaru hæddini í ítróttar-húsinum í sambandi við dystir hjá 1. liðnum, eru aftur í ár til dystin fús, sjálvt um umstøðurnar eru avmarkaðar. Hildi-garð stendur fyri, men hon fær góða hjálp frá øðrum. Í sølubúðini selja tey sodavatn, kaffi, te, køkur og góðgæti. Sølu-búðin hevur opið frá dyst-arbyrjan til nakað eftir dystin.

Sjálvt um hølisviður-skiftini ikki eru av teimum bestu, so er tað eisini í sølubúðini, at prátið um dystin, leikararnar og venjaran fer fram - bæði í hálvleikinum og eftir dystin. So verið vælkomin øll somul.

Framhald frá bls. 3

leika fótbólt á hægri støði aftur. Missurin av hesum tóktist sum steinur oman á byrðu, tá ið fleiri av hinum føstu leikarunum samstundis vóru skaddir.

– Ringast fyri av hesum var og er Gunnar, sum hevur ein keðiligan vødda-skaða í búkinum, sum ger, at hann ikki fær spælt fótbólt í løtuni. Hann er farin at venja aftur, men tað er óvist, nær hann verður tøkur. Gunnar hev-ur nú ikki vant í nærum átta vikur.

Tí vóru vónirnar til dystirnar á Tvøroyri og á Eiði tey bæði seinastu viku-skiftini, neyvan serliga góðar hjá fleiri av okkum viðhaldsfólkum. Men her vildu ALLIR prógva tað øvugta; nevnliga at vit vilja vinna, sjálvt um vit eru illa mannaðir. Innsatsurin hjá monnum var fyrimyndarligur; tori at siga, so góður sum ongantíð fyrr í ár. Menn stríddust og kempaðu fyri hvørjum bólti. Og ikki minst týdningarmikið var tað, at tað gav úrslit. – Ein 0-1 sigur á Sevmýri og har-við tóku vit frástøðu frá TB og ein 1-1 javnleikur móti EB/Streymi, sum annars hevur víst gott spæl sein-astu dystirnar. Á Eiði vóru vit enntá so óhepnir, at skora sjálvmál móti endanum, tá ið bólturin onkursvegna raktin ein trýstan Bartal í andlitið og framvið einum annars sera vælleikandi Jacob í málinum.

Tí vænta vit í dag, líkamikið liðuppstilling, at menn fara inn at vísa sama innsats sum teir báðar síðstu dystirnar. Sum venjingin hevur verið hesa vikuna er víst, at Gunnar ikki er tøkur, meðan Pól er ivasamur. Meðan Gunnar rann á vøllinum týsdagin og er í gongd við uppvenjing, vandi Pól ikki týsdagin. Pól fekk eina fipur í bak-lærinum í dystinum ímóti TB. Umframt teir báðar, er Tórður framvegis skaddur. Bartal var heldur ikki til venjing týsdagin, men hann er helst tøkur í dag. Sylla og Hanus, sum hava drigist við smáskaðar hava vant 100% síðstu dagarnar. Annars er gleðiligt at síggja, at nýggju menninir, Jacob og Emil, stórtrívast bæði á vøllinum og uttanfyri. Og tað er eisini gleðiligt at okkara egnu, sum kanska ikki hava fingið so nógvar kjansir, spæla til sítt besta og eru við at mynda liðið. Gott dreingir.

Drívið á dreingir, og fara vit á bakkanum í dag at gera okkara fyri at úrslitið verður til okkara fyrimun. Góðan dyst.






Keyp ein tennisbólt

og tú kanst vinna ein Apex-flogferðaseðil.
Í hálvleikinum skulu bóltarnir tveitast út á vøllin.
Tann bólturin, sum liggur næst miðblettinum,
vinnur Apex-flogferðaseðilin.

Kostnaður 30,-

ATLANTIC AIRWAYS

# ÁRSINS ÍF-ARI 2005

## TVEY MÁL OG BESTUR ÍMÓTI KÍ

Í móti týdningarmikla sigrinum ímóti KÍ leygarkvøldið á Varmakeldu, valdu áskoðararnir tveymáls-skjúttan Bartal, at vera besta leikaran. Støðan í kappingini er nú, at Eyðolvur framvegis er nr. 1 við 197 atkvøðum, Símun nr. 2 við 137 og Poul nr. 3 við 130 atkvøðum.

Fyri at verða besti leikarin í móti KÍ fær Bartal ein sunnudagsdøgurða fyri tvey á Restaurant Muntra.



Tann leikarin, sum veljarin heldur hevur spælt best, fær 5 stig, næstbesti 3 stig og triðbesti 2 stig. Síðan verður talt saman eftir hvønn dyst og úrslitið sæst í leikskránni til komandi dyst. Atkvøðuseðlarnir fáast í ovaru hæddini í Ítróttarhúsinum. Seðilin her á síðuni kann eisini nýtast. Hvør veljari hevur bert loyvi at lata ein seðil inn til hvønn dyst.

Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hæddina í Ítróttarhúsinum í seinasta lagi 15 minuttir eftir loknan dyst.

### Støðan

| Leikari | Seinast | Íalt |
|---|---|---|
| Bartal | 36 | 96 |
| Eyðolvur | 34 | 197 |
| Áki | 20 | 53 |
| Símun | 17 | 137 |
| Magni | 13 | 53 |
| Fritleif | 11 | 25 |
| Atli | 7 | 32 |

## VINNINGAR

Ársins ÍF-ari fær 1.000,-
Nr. 2 fær 500,-
Nr. 3 fær 500,-

Fa. Eilif Arge í Klaksvík letur prýðislutir til nr. 1, 2 og 3

EILIF ARGE

Restaurant Munta letur sunnudagsdøgurða fyri tvey til besta leikaran í hvørjum av landskappingardystunum í ár

Restaurant Muntra

Tá ið kappingarárið er av, verður lutakast millum allar atkvøðuseðlarnar um eitt krov frá Keypssamtøkuni

## ATKVØÐUSEÐIL ÍF-GÍ, 21. august 2005

Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hædd í ÍF-húsinum í seinasta lagi 15 minuttir eftir loknan dyst. Besti leikarin verður kunngjørdur í komandi leikskrá

Nr 1 (5 stig) ____________________

Nr 2 (3 stig) ____________________

Nr 3 (2 stig) ____________________

Veljari / tel: ____________________



## STØÐAN FORMULADEILDIN - 15. AUGUST

| | Lið | D | V | J | T | V - T | S | Heima | Úti |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Skála | 19 | 10 | 7 | 2 | 41 -21 | 37 | 6 - 4 - 1 | 4 - 3 -1 |
| 2 | B36 | 19 | 10 | 7 | 2 | 28 -11 | 37 | 5 - 3 - 2 | 5 - 4 -0 |
| 3 | HB (m) | 19 | 10 | 4 | 5 | 51 -23 | 36 | 7 - 1 - 1 | 3 - 3 -4 |
| 4 | NSÍ | 19 | 9 | 6 | 4 | 30 -23 | 33 | 6 - 3 - 0 | 3 - 3 -4 |
| 5 | EB/Str. | 19 | 6 | 9 | 4 | 25 -26 | 27 | 2 - 7 - 0 | 4 - 2 -4 |
| 6 | ÍF | 19 | 5 | 5 | 9 | 22 -43 | 20 | 3 - 1 - 5 | 2 - 4 -4 |
| 7 | GÍ | 19 | 5 | 4 | 10 | 24 -34 | 19 | 2 - 2 - 4 | 3 - 2 -5 |
| 8 | VB | 19 | 5 | 4 | 9 | 24 -35 | 19 | 4 - 2 - 5 | 1 - 2 -4 |
| 9 | KÍ | 19 | 5 | 2 | 12 | 25 -36 | 17 | 2 - 0 - 6 | 3 - 2 -6 |
| 10 | TB (u) | 19 | 3 | 5 | 11 | 16 -33 | 14 | 2 - 3 - 3 | 1 - 2 -8 |

## LEIKARAHAGTØL FORMULADEILDIN 2005

| | Leikari | Min | D | Ut | Inn | G | R | M | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Allan Joensen | 939 | 11 | 1 | - | - | - | (22) | 100 |
| 2 | Áki Petersen | 606 | 10 | - | 4 | - | - | - | 53 |
| 3 | Sverri Ellingsgaard | 71 | 2 | 1 | 1 | - | - | - | - |
| 4 | Tordur Egholm | 24 | 1 | - | 1 | - | - | - | - |
| 5 | Poul Ennigarð | 1.311 | 15 | 1 | - | 1 | 1 | 1 | 130 |
| 6 | Bartal Eliasen | 1.274 | 16 | - | 2 | 6 | - | 2 | 96 |
| 7 | Bárður á Lakjuni | 28 | 3 | - | 3 | - | - | - | - |
| 8 | Fritleif í Lambanum | 1.054 | 14 | 3 | 2 | 5 | - | - | 25 |
| 9 | Atli Petersen | 468 | 13 | 3 | 12 | - | - | 1 | 32 |
| 10 | Hanus Eliasen | 979 | 16 | 6 | 5 | - | - | - | 40 |
| 11 | Eyðolv Petersen | 1.179 | 14 | 1 | 1 | 1 | - | 1 | 197 |
| 12 | Gunnar Nielsen | 966 | 13 | 6 | 3 | 1 | - | 3 | 117 |
| 13 | Roy Róin | 25 | 1 | - | 1 | - | - | - | - |
| 14 | Emil N. Leifsson | 204 | 3 | - | 1 | - | - | - | - |
| 15 | Eyðun Ryggshamar | 312 | 4 | 3 | - | 1 | - | - | - |
| 16 | Emil Toftegaard | 51 | 1 | - | 1 | - | - | (1) | - |
| 17 | Høgni Zachariassen | 1.620 | 18 | - | - | 2 | - | 3 | 63 |
| 18 | Rúni Eyðunsson Eltør | 1.173 | 14 | 6 | - | 3 | - | 2 | 54 |
| 19 | Frank Poulsen | 268 | 5 | 1 | 2 | - | - | - | - |
| 20 | Sylla Amed Davy | 1.458 | 18 | 8 | 1 | 2 | - | 2 | 63 |
| 21 | Jonn Sólheim Thomsen | 552 | 7 | 1 | - | 3 | - | - | 7 |
| 22 | Jákup Helgi Egholm | 90 | 1 | - | - | - | - | (3) | - |
| 23 | Tórður Thomsen | 360 | 4 | - | - | - | - | (13) | 11 |
| 24 | Jacob Kaas | 180 | 2 | - | - | - | - | (1) | - |
| 25 | Dánjal Pauli Højgaard | 16 | 2 | - | 2 | - | - | - | - |
| 28 | Magni á Lakjuni | 1.162 | 16 | 4 | 4 | - | - | 4 | 53 |
| 30 | Símun Eliasen | 1.440 | 16 | - | - | 5 | - | 1 | 137 |

### Aðrir dystir í Formuladeildini í dag – 20. umfar

VB - Skála
KÍ – EB/Streymur
HB - TB
NSÍ – B36

### Dystir í Formuladeildini sunnudagin 28. august – 21. umfar

EB/Streymur - HB (spældur leygardagin 27. august)
Skála - ÍF
B36 - VB
GÍ - KÍ
TB - NSÍ

### Dystir í 3. deild í dag – 12. umfar

B68 – Fram
ÍF – SÍ
Skála – NSÍ
HB – VB
KÍ – EB/Streymur

### Málskjúttar formuladeildin

| | |
|---|---|
| Bogi Gregersen, Skála | 11 |
| Hans á Lag, HB | 10 |
| Chr. H. Jacobsen, NSÍ | 10 |
| Súni Olsen, GÍ | 9 |
| Jonhard Fredriksberg, Skála | 8 |
| Tór-Ingar Akselsen, HB | 8 |
| Dan Djurhuus, VB | 7 |
| Heðin á Lakjuni, KÍ | 7 |

### VERT AT VITA

Grannauppgerðin í dag ímóti GÍ er okkara triði landskappingardystur ímóti gøtumonnum í ár. Fyrsta dystin í Fuglafirði vunnu vit 4-3, meðan vit taptu 3-0 í sera vánaligum avriki í Gøtu 29. mai. Í dag vóna vit tí, at dysturin verður ein endurtøka av fyrsta dystinum. – ALLIR fuglfirðingar vóna helst eisini, at vit í dag vísa, at vit eru betri enn 4-1 tapiði finaluni um Løgmanssteypið á ólavsøku ímóti GÍ vísti.

Næsta sunnudag, 28. august, spæla okkara menn á Skála ímóti topp- og – eftir okkara tykki – besta liðnum í ár. Vit hava higartil spælt tvær ferðir ímóti Skála, og báðir dystirnir hava verið serliga spennandi og eru endaðir við javnleiki.

3. deild hjá okkum spælir í dag ímóti toppliðnum SÍ heima. Dysturin verður beint eftir 1. deildardystin. Næsta sunnudag spæla teir á Skála. Í løtuni liggur 2. lið hjá okkum á einum 3. plássi í deildini.

# ÍTRÓTTARFELAG FUGLAFJARÐAR

| ÍF-LIÐIÐ | | GÍ-LIÐIÐ |
|---|---|---|
| 1 | Emil Toftegaard | Poul N. Joensen |
| 2 | Áki Petersen | Leivur Hansen |
| 3 | Sverri Ellingsgaard | Robert Rzeczycki |
| 5 | Poul Ennigarð | Kaj Ennigarð |
| 6 | Bartal Eliasen (liðsk.) | Hans Jørgen Djurhuus |
| 7 | Bárður á Lakjuni | Jónreid Dalheim |
| 9 | Atli Petersen | Sámal Joesen |
| 10 | Hanus Eliasen | Sam Jacobsen |
| 12 | Gunnar G. Nielsen | Hanus Jacobsen |
| 13 | Dánjal Pauli Højgaard | Poul Arni Jacobsen |
| 14 | Emil N. Leifson | Magni Jarnskor |
| 15 | Eyðun Ryggshamar | Krzysztof Popczynski |
| 16 | Jacob Kaas | Áslakur R. Petersen |
| 17 | Høgni Zachariassen | Sam Jacobsen |
| 18 | Rúni Eyðunsson Elttør | |
| 19 | Frank Poulsen | |
| 20 | Sylla Amed Davy | |
| 30 | Símun Eliasen | |

**Venjari:**
Petur Simonsen
**Hjálparvenjari:**
Sonni Jensen
**Liðleiðari:**
Símun Fornagarð
**Fysioterapeut:**
Álvur Hansen

**Venjari**
Krzysztof Popczynski
**Hjálparvenjari**
Pauli Jarnskor
**Liðleiðari:**
Álvur Joensen
**Hjálparfólk**
Svenn Olsen

formuladeildin

**PETUR REINERT**
**Jan og Jóannes**

**M/B ROYNDIN FRÍÐA**